# "Hvussu kunnu vit sum foreldur styrkja málmenningina hjá børnum okkara?"

Málsligt menning sum fyritreyt fyri lesing

karolinam@setur.fo

# Hvat hyggja vit ofta at í barnsins menning?

1. Fjølbroyttu persónligu menningini hjá barninum
2. Sosialum førleikum
3. Málinum (hvussu er tað tengt at hinum evnunum?)
4. Likami og rørslu
5. Náttúruni og náttúrufyribrigdum
6. Mentanarligum hættum og kynstrinum at bera fram

karolinam@setur.fo

# Málið og at arbeiða við málinum

- Hvussu brúka vit vitan um málmenning í gerandisdegnum?
- Hvussu stuðla vit ítøkiliga málsligu menningini hjá barninum?

karolinam@setur.fo

# Hvat er týdningarmikið?

- Hvussu  verður tað, sum børnini bera fram, tikið í álvara, so tey verða stimbrað málsliga í gerandislívi teirra?

- Hvussu kunnu karmar verða skaptir fyri menningini av málsligu førleikanum hjá børnum?

karolinam@setur.fo

# Byrjanarstøði

- Børn læra málið saman við sínum kæru: umsorganarpersónunum
- Tað er ein ótrúlig tilgongd, sum lítla barnið fer ígjøgnum
- Tey byrja við at læra at skyna á ljóðum og koma fram til at menna eitt virkið mál

karolinam@setur.fo

# At ogna sær móðurmálið

- Tætt tilknýti til umsorganarpersónin
- Menningin av fyrstu tilvitanini um ljóð
- Tættir, sum ávirka hetta

karolinam@setur.fo

# At ogna sær móðurmálið

- Ein fyritreyt er barnsins senso-motoriski førleiki
- Onnur fyritreyt er førleikin at sansa/fata

karolinam@setur.fo

# At ogna sær móðurmálið

- Barnsins førleikanarháttur at arbeiða við ljóðum, so tað gerst møguligt at bera tað, sum liggur tí á hjarta, fram
- Veruleikin, at samrøðan hevur eitt sosialt endamál

karolinam@setur.fo

# At ogna sær móðurmálið

*Avmarkingar:*

- Lívfrøðiligar avmarkingar
- Málið, sum tosað verður rundan um barnið

karolinam@setur.fo

# At ogna sær móðurmálið

- Fyrsta árið ger barnið eina rúgvu av ljóðum
- Her spæla fleiri tættir inn, um menningin skal gerast góð

karolinam@setur.fo

# Ein felags trupulleiki

- Børn við málsligum trupulleikum trívast ikki væl
- Børn við málsligum trupulleikum eru í vanda fyri at detta niður ímillum
- Børn við málsligum trupulleikum fáa ofta trupulleikar við læring í skúlanum

karolinam@setur.fo

# Ein felags trupulleiki

- Vit fáa ofta alt ov seint eyga á hesi børn
- Hesi børn eru dupult so viðkvom
- Bíðitíð er spilt tíð fyrstu umráðandi barnaárini

karolinam@setur.fo

# Ber tað til at gera ”ætlanir” fyri, hvat børn skulu læra? Hvat skulu vit serliga geva okkum far um?

- Hugsanir um læring er høvuðsspurningurin – at læra ímóti at læra ***seg***
- Partar av málinum
- Kann hetta pettast sundur? Málið er allastaðni – fá eyga á tað…

karolinam@setur.fo

# At læra - ella at læra seg?

Til ber *ikki* at leggja til rættis, *hvat* einstøku børnini skulu læra seg og *hvussu* øll børn læra alt møguligt, men til ber at skapa karmarnar fyri, at tey kunnu læra

karolinam@setur.fo

# Hvussu mennast væl málsliga?

- Tilognan av førleikum og vitan í náttúrligum samspæli í náttúrligum umstøðum

- Gjøgnum málið flytir barnið seg inn í okkara mentanarheim

karolinam@setur.fo

# At læra ella at læra seg?

Sjálv (inn)læringin er okkurt, sum hendir *í tí, sum lærir*, okkurt, sum persónurin sjálvur ger

Vit tosa sostatt ikki um óvirki at ”geva” barninum málið, men um at skapa karmar, sum eru gagnligir fyri, *at barnið kann læra seg* t.d. eitt ríkt og fjøltáttað mál

*Hvussu kunnu tílíkir karmar síggja út?*

karolinam@setur.fo

# Partar í málinum

- Innihald
- Formur
- Virksemi

karolinam@setur.fo

# Kunnu hesi skiljast sundur?



karolinam@setur.fo

# Mál er dynamiskt

- Mál er ikki nakað ein hevur ella ikki hevur. Mál verður ment alla tíðina
- Líka mikið hvørjari læringsstøðu vit eru í, er málmenning ein partur av tí
- Vit mugu hugsa mál breitt og sum eina grundvond

karolinam@setur.fo

# Betur móðurmálið er ment, læ20ttari er at læra nýggj mál

- Gransking vísir eisini, at besta grundarlagið at læra fleiri mál er eitt dygt lært móðurmál/samskiftismiðil, sum leggur støðið undir allari framtíðar læring

karolinam@setur.fo

# Samlaðu málsligu førleikarnir

Tey málini, ein dugir, eru tilsaman ein nøgd. Tá ið vit hugsa, tosa, og skriva brúka vit okkara *samlaða málsliga førleika*

Sostatt fáa vit gleði av øllum málunum, sum vit hava lært, tá ið vit hugsa, tosa ella skriva

karolinam@setur.fo

# Hvussu læra vit mál?

- Vit læra *í høvuðsheitum* málið, tá ið vit eftirkanna gitingar og finna fram til, um tær eru sannar ella ósannar
- Herming og endurtøka er ein týðandi háttur at læra málið
- Vitborin evni hava eisini stóran týdning

karolinam@setur.fo

# Hvat virksemi stuðlar máltilognanini?

- *Góða samrøðan*:
- Har lurtað verður eftir barninum og har barnið fær møguleikan at bera fram tað, sum tað hevur upp á hjarta

karolinam@setur.fo

# Góða samrøðan, har báðir partar sleppa fram at at tosa

Børn og vaksin tosa saman. Báðir partar spyrja og svara. Tey fortelja hvørjum øðrum frá upplivingum, koma við tulkingunum, meiningum, royndum og vitan

karolinam@setur.fo

# Málsligt mennandi virksemi

- Hin vaksni leggur dent á at leiða barnið inn í ávís evni við m.a. at greiða frá. Í tílíkum førum lurta børnini og taka upp aftur tí, sum hin vaksni hevur greitt frá

karolinam@setur.fo

# Málsligt mennandi virksemi

- Hin vaksni  fortelur og barnið lurtar og fylgir ávísingunum
- Hin vaksni spyr og barnið svarar, um tað er ført fyri tí

karolinam@setur.fo

# Hin vaksni hevur ábyrgdina

- at geva øllum børnum atgongd til góðu samrøðuna

- *Hvussu geva vit børnum atgongd til góðiu samrøðuna?*

karolinam@setur.fo

# Fyrireiking til lesing

- Upplestur, har tosað verður um tað lisna
- Logografisk lesing – samla orð  t.d. SSL
- Børn sleppa at luttaka í tí skriftmálsliga í dagligdegnum

karolinam@setur.fo

# Fyritreytir

- Læra bókstavir í innihaldsríkum sambandi við onnur
- Bókstavir er ein úrtøkilig skipan, sum ikki geva nakra meining í sjálvum sær

karolinam@setur.fo

# Hvat virksemi fyrireikar barnið til lesing?

- ”Bøkurnar”, ið barnið sjálvt ger, t.d. tá ið tey sleppa at spæliskriva
- At foreldur ella onnur lesa fyri børnum og t.d. siga  frá søgum og greiða frá hendingum

karolinam@setur.fo

# Nýggjar  fakligar avbjóðingar

*Politisk nýhugsan*

- Øll børn skulu fáa eina góða skúlabyrjan
- Málmenningin skal styrkjast hjá smábørnum
- Allýsa leiklutin sum námsfrøðing og lærara av nýggjum:

 - Í mun til málmenning og lesing

 - Í mun til at  byggja brúgv millum dagstovn og skúla

karolinam@setur.fo

# Nýggjar avbjóðingar

- Menning er farin í gongd á økinum
- Námsfrøðiligar læruætlanir á dagstovnaøkinum
- Málmenning er eitt øki, sum arbeitt verður við

karolinam@setur.fo

# Foreldur eiga at fáa kunning

T.d. um at

- Orðfeingið verður ment í gjøgnum nýggjar royndir
- Talan er bæði um virkið og óvirkið orðfeingi
- Stuttligar endurtøkur hjálpa til við læringini av orðum

karolinam@setur.fo

# Foreldur eiga at fáa kunning um

- At virksemi har allir sansir verða brúktir, geva bestu úrslitini
- At  skapandi arbeiði er sera týdningarmikið í mun til málmenning

Minnist til at seta orð á tað, sum tit gera saman við børnunum

karolinam@setur.fo

# Hent vitan

- Alt virksemi fer frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga
- Børnini mugu kenna, at tað sum tey gera er týdningarmikið

- Støði kann t.d. takast í einum ævintýri

karolinam@setur.fo

# Fimm meginøki har málmenning fer fram

- At skilja verðina rundan um seg
- At duga at fáa samband við onnur og samskifta við tey
- At menna orðfeingi
- At skilja málið og reglurnar fyri málinum
- At duga at málbera seg fjølbroytt

karolinam@setur.fo

# Heima

- Les ofta hart fyri børnum og halt á við hesum eisini eftir at børnini duga at lesa
- Les dygdarbókmentir. Hetta hjálpir børnum at fáa størri og fjølbroyttari orðatilfeingi
- Børn, ið eru von at lurta nógv eftir góðum máli, hava lættari við at ljóðseta ókend orð, tí tey hava hoyrt orðið áður og vita, hvat tað merkir

karolinam@setur.fo

# Heima

- Spæl orðaspøl
- Syng ella les barnarímur
- Har kunnu tit saman hyggja at rímunum og tosa um tær og stuttliga innihaldið. Eisini kunnu tit hyggja at t.d. hvar punktum er og hvør bókstavur kemur aftan á

karolinam@setur.fo

# Heima

- Tað kann eisini vera eitt “spæl” at keypa inn: hvussu eita ymisku morgunmatasløgini, hvat stendur á pakkunum osfr.  Hvat slag dámar barninum best?
- Eitt stuttligt spæl er magnetbókstavir á køliskápinum. Hesir verða fluttir, meðan tit arbeiða í køkinum
- Barnið sleppur at vera uppií at gera mat og tosað verður um tað, sum tit gera

karolinam@setur.fo

# Heima

- Ger nógv av at lesa. At menna lesing krevur, at nógv verður lisið (lesiførleikin er sera samansettur og krevur fyri summi børn nógva venjing og her er upplesturin sera góður)

- Eisini tað at skiftast um at lesa (dialogiskur upplestur) er sera mennandi)